# Nútímans tónar í Samuelskirkjuni

**Klaver, kontrabassur og kórið Kurpalið fara at seta dám á guðstænasuta 1. hvítusunnudag kl. 14:00.**

GUDSTÆNASTA
*Tíðindaskriv*

Hvítusunnudagur er jú føðingardagur kirkjunnar, og soleiðis eisini ein av stórstu veitsludøgunum í kirkjuárinum. Í hesum sambandi vitja Stamen Stanchew og Agnar Lamhauge enn einaferð kirkjuna og spæla præ- og postludium við íblástri úr gomlum føroyskum sálmatónum; og Leif Hansen, ið er tónleikalesandi og reguligur avloysari sum organistur hjá donsku meinigheitini í Samuelskirkjuni, stjórnar kórinum Kurpalið, ið savnast tá høvi býst. Bergur Jacobsen prædikar.

Føroyska kirkjuliðið í Keypmannahavn verður 80 ár í heyst, og hevur síðandi miðskeiðis í sjeytiarunum savnast í Samuelskirkjuni. Áður hevur kirkjuliðið, til dømis, savnast í Abel Katrinu kirkjuni, ið ikki longur finnst, í Mariu Kirkjuni og í Vartov kirkju; og síðani Peter Andrew Petersen fekk lønt starv sum prestur hjá kirkuliðinum, í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65 á Nørrebro. Frammanundan honum vóru tað prósturin og prestarnir Gudmund Bruun, Emil Joensen og Jóhan Nielsen, ið tóku sær av føroysku guðstænastunum í Keypmannahavn.

Fysisku karmanir fyri arbeiðinum í Samuelskirkjuni eru av teimum allarbestu, og eru ein góð avbjóðing til ungar føroyingar sum flyta til Keypmannahavnar og ynskja at menna støðuna hjá føroysku kirkjuni her á landi og í Føroyum. Lesandi føryingar hava, sum er, sera áhugaverd kjakkvøld í kirkjuni triðja fríggjakvøld í mánanum, har aktuel átrúnarlig og samfelagslig viðurskifti verða viðgjørd.

Aftaná allar guðstænasturnar er høvi til at savnast um ein drekkamunn, og at fáa prát við landsmenn og kvinnur. Og í kryptini (kirkjukjallaranum) er tað sum at koma heim, siga mong, tí kend føroysk list, hjá Amariel Norðoy prýðir veggirnar.

## Nýggj nevnd

Føroya Astma/Allergifelag hevði aðalfund 2. apríl. Á hesum var sjálvandi nevndarval á skránni, og hevur nevndin nú skipað seg soleiðis: Evy Danielsen er formaður, Bozenu Rasmussen eru næstformaður og skrivari, Elisabeth Ziska Jacobsen er kassameistari. Tiltakslimir eru Maria Jacobsen og Brita Durhuus.

-jm

# Messell vann Band Battle



*Terji Messell á pallinum á Skråen í Aalborg um vikuskiftið*

Leygarkvøldið vann føroyski tónleikarin Terji Messell eina tónleikakapping í Danmark.

Kappingin kallaðist Band Battle og var hildin í Aalborg. Í bólkinum »Årets Nordjydske Singer/ songwriter« gjørdist Terji Messell vinnari. Tað vóru DMF (Dansk Musiker Forbund) og spælistaðið Skråen í Aalborg, sum skipaðu fyri kappingini.

Terji Messell, sum seinnu árini hevur búð í Danmark og virkað sum tónleikari har, vann 5000 krónur og onkrar konsertframførslur. Harafturat fær hann nógva umtalu av kappingini.




Tyrlutænastan hjá Atlantic Airways

**Tyrluflúgvingin á Hvítusunnu 2005**

**Hvítusunnudag** 15. mai verður ikki flogið.
**2 Hvítsunnudag** 16. mai flúgva vit sum sunnudag.

www.sansir.fo

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 60 · Faks 34 10 01 · tyrlan@atlantic.fo

www.atlantic.fo





*Lagaligar løtur vóru ikki nógvar hjá einum manni sum var mynstraður yvir 300 dagar um árið í eitt 15 ára skeið frá 1958 til 1964. Her er ein mynd á trolaradekki og ein á ferð uttanlands saman við konuni.*

**Myndir til ævisøguna um Kaj**

Onnur bókin, í ævisøguni um Kaj Johannesen úr Hvannasundi, verður nú skrivað, og kemur, um alt gongur eftir vild, út í heyst. Hon fer serliga at snúgva seg um krígsárini við Skálabergi og Nærabergi. Tíðina umborð á Dragabergi, Sjúrðarbergi og týska Skálabergi.

Í hesum sambandi sóknast høvundurin eftir myndum frá æviskeiði hansara. Í fyrstu atløgu hava allar myndir, sum hava nakað við virki og lív hansara áhuga. Tað verið seg myndir umborð á skipi, ikki bara myndir av Kaj, men eisini av lívinum umborð. Myndir av monnum, sum sigldu við Kaj hava áhuga og eisini myndir umborð á trolarum, sum brøður hansara førdu. Eg havi eisini áhuga fyri myndum tiknum umborð á øðrum trolarum, av føroyskum trolarum undir fiskiskapi. Gerandismyndir av arbeiðsgevaranum hjá Kaj, J. F. Kjølbro, hava stóran áhuga.

Liggja tit inni við slíkum myndum, so hevði eg verið ógvuliga fegin, um tit settu tykkum í samband við meg.

**vinarliga**
Jústinus Leivsson Eidesgaard,
*rithøvundur*

**KAJ2**
Ein dokumentarisk ævisøga

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard
Ovaragøta 1 · 188 Hoyvík
Tel. 22 31 43 · justinus@post.olivant.fo

FØROYAPRENT - TEL. 314 555